# Grandi sigur upp

Stóra íslendska fiskivinnufyritøkan Grandi kunngjørdi í gjár, at hon hevur gjørt av at gevast við at hagreiða botnfisk á virkinum, sum felagið hevur á Akranesi. Orsøkin er, at toskakvotan er so nógv skerd, og kanningar hava víst, at tað loysir seg ikki at flyta annan fisk so sum upsa á virkið at hagreiða. Umleið 60 fólk hava arbeitt við at hagreiða botnfisk á Akranesi, og tey eru nú uppsøgd. 20 fólk skulu halda fram at hagreiða lodnurogn.



*Avgerðin at skerja toskakvotuna rakar nú eisini Akranes (Mynd: Morgunblaðið)*

grundina, so verða allir hesar brunnar mettir at goyma kolvetni. Hetta er longu staðfest á Cambo og Rosebankleiðunum og skal nú endaliga svarið fáast, áðrenn sett verður á at byggja út. Teir báðir brunnarnir, sum borast skulu á Føroyøkinum, liggja í jarðfrøðiligum økjum, sum líkjast teimum bretsku megin markið.

### Ikki endin

Samanumtikið kann sigast, at hóast Williamboringin verður eitt vónbrot, so verður tað ikki endin á oljuleiting við Føroyar. Leitiðvirksemi báðumegin markið fer at halda fram. Ja útlit eru entá góð fyri, at vit fara at síggja tvær framleiðandi oljukeldur á bretskum øki skamt frá markinum um ikki so mong ár. Hendir tað at framtíðar brunnarnir vit hava umrøtt her – á føroyskum øki – goyma kolvetni, tá kunnu hesir troyta bretska infrastrukturin í grannalagnum. Og her skulu vit eisini hava í huganum, at oljufeløg og breskir myndugleikar júst í hesi løtu arbeiða við eini verkætlan at menna gassfund vestan fyri Hetland samtíðis sum eitt undirstøðukervi verður útbygt.

Víst hevur Williambrunnurin størsta áhugan í løtuni. Vit eiga tó ikki at gloyma aðra týðandi leiting og møguliga útbygging, sum verður at fara fram á Atlantsmótinum komandi árini.




*Vit síggja her part av borivirkseminum á føroyska landgrunninum og í bretskum øki tætt upp at markinum í næstu framtíð. Williambrunnurin (1) verður boraður í løtuni. Næsta ár verður Anne Marie brunnurin á føroyskum øki boraður (2). Seinni í heyst verða avmarkingarbrunnar boraðir á Cambofundinum í bretskum øki stutt frá markinum (3). Komandi vetur ella á vári 2009 verða avmarkingar- og møguliga útbyggingarbrunnar boraðir á Rosebankfundinum (4). Loksins verður leitibrunnur helst boraður í 008 loyvinum (Súlan og Stelkur) á føroyska landgrunninum í 2009 (5)*